# 200 blóðroyndir um dagin

**Marita Arge hevur starvast á laboratoriinum á Landssjúkrahúsinum í 46 ár. 31. januar fer Marita frá sum leiðari á laboratoriinum vegna pensjónsaldur, meðan Ivy Hansen verður sett sum nýggjur leiðari**



*Fráfarandi leiðarin, Marita Arge, tekur her eina blóðroynd av næsta leiðaranum, Ivy Hansen*

Mynd: Jens Kr. Vang

LEIÐARASKIFTI
*Ingrid Bjarnastein*

– Ta tíðina eg havi starvast á laboratoriinum hava ótrúliga nógvar broytingar verið, sigur Marita Arge, sum um átta dagar fer frá sum leiðari á laboratoriinum. – Í fyrstani var alt arbeiðið gjørt manuelt, meðan vit í dag er alt automatiserað. Tá eg kom her 1. januar 1956 høvdu vit eitt lítið høli, sum var umleið 10 fermetrar. Nú hava vit meira pláss, men umstøðurnar eru framvegis ikki góðar, tí vit hava alt ov lítið pláss til øll tólini. Eisini eru laboratoriini spjadd yvir fýra ymisk støð, umframt hæddina, sum vit hava fingið.

Ivy Hansen hevur starvas á laboratoriinum í 30 ár. Hon tekur við, sum leiðari, tá Marita nú fer frá.

– Ein leiðari hevur ábyrgdina av, at alt gongur rætt fyri seg, og at alt arbeiðið verður gjørt sum tað skal. Leiðarin er suverenur leiðari fyri laboratoriið, og hevur hann eisini ábyrgdina av starvsfólki og rakstri, greiða Marita og Ivy frá.

Men hvat hevur eitt leiðaraskifti at siga fyri arbeiðið á laboratoriinum?

– Tað fyrsta eg fari at gera er at seta meg inn í arbeiðið, og síggja, hvat arbeiðið gongur út uppá, sigur Ivy Hansen. – Síðani fáa vit at síggja, hvussu verður. Helst verða onkrar broytingar so við og við, tí annars hevði tað ikki verið rætt.

## Øðrvísi

Laboratoriið á Landssjúkrahúsinum er øðrvísi enn tey flestu í danska kongaríkinum. Her eru øll spesialini samlað á einum stað, meðan í Danmark er eitt spesiali í einari amt. Tær báðar siga, at um dagin taka tær millum 150 og 200 blóðroyndir um dagin, umframt tær blóðroyndirnar, ið verða sendar teimum frá sjúkrahúsunum í Klaksvík og Suðuroy.

Nú Marita Arge fer úr starvinum sigur hon, at nú fer hon at hava betur tíð til hondarbeiði. Eisini plagar Marita at ganga við felagnum Tórshavn, og tað ætlar hon ikki at leggja á hyllina sjálvt um hon skal pensjonerast.

Marita Arge og Ivy Hansen eru báðar útbúnar sum bioanalytikarar í Danmark. Sosialurin ynskir teimum báðum góða eydnu í framtíðini.

# Nú kostar at hava postboks

POSTGJALD
*Ingrid Bjarnastein*

Heilt til fyri tveimum árum síðani hevur tað verið ókeypis hjá føroyingum at havt postboks. Bæði hjá privatpersónum og vinnuvirkjum. Fyri tveimum árum síðani gjørdi Postverkið so av, at áseta eitt gjald fyri postboksir hjá vinnuvirkjum, áljóðandi 150 krónur um árið, meðan tað framvegis var ókeypis hjá privatpersónum at hava postboks. Nú hevur Postverkið gjørt av at áseta eitt gjald á 50 krónur fyri privatar boksir, meðan boksirnar hjá virkjum hækka til 200 krónur um árið.

– Vit hava avgjørt, at áseta eitt gjald fyri postboksirnar, tí tænastan er hægri, tá tú hevur boks enn tá tú fært postin útbornan, sigur Bergur í Garði, stjóri á Postverki Føroya.

– Føroyar liggja framvegis í tí lægra endanum, tá tosað verður um kostnað fyri boksir. Í øðrum londum kann tað vera rættiliga dýrt hava eina postboks. Í londunum rundan um okkum kostar tað 2-300 krónur fyri eina boks.

Bergur í Garði sigur, at hetta er ein liður í at taka eitt gjald fyri allar tær tænastur Postverkið letur. Allur posturin í miðstaðarøkinum er sorteraður longu um kvøldið, soleiðis at fáast kann fatur á honum longu um kvøldið, meðan um tú skalt hava postin útbornan, fært tú hann ikki fyrr enn dagin eftir.

Tó heldur postverksstjórin ikki, at hetta fer at kosta teimum postbokskundar.

– Tað kann vera, at vit missa onkrar einstakar postboksir, ið ikki verða nýttar nakað serligt, men eg trúgvi ikki, at tann privati kundin fer at nokta at gjalda 50 krónur um árið fyri postboksina, sigur Bergur í Garði.

At fáa postin útbornan er framvegis ókeypis, og ætlanir eru ikki um at áleggja nakað gjald fyri hetta í framtíðini.

# Útvarpið fingið nýtt snið

ÚTVARP
*Ingrid Bjarnastein*




*Heimasíðan hjá Útvarpi Føroya hevur fingið nýtt snið, og eisini er nýtt tilfar at síggja*

Nýggja heimasíðan hjá Útvarpi Føroya fór av bakkastokki í gjár, og hevur útsjóndin hjá útvarpinum á netinum nú fingið nýtt skap við nýggjum møguleikum.

Sum nakað nýtt er útvarpið eisini farið undir at leggja seg eftir tíðindaflutningi á netinum. Hetta er ikki nakað nýtt í fjølmiðlahøpi, men tíðindi hava fyrr ikki verið tøk á heimasíðuni hjá útvarpinum.

– Hetta er ein miðil, sum vinnur seg meira og meira fram, og hetta var eitt tilboð vit hava valt at geva lurtaranum, sigur Jógvan Jespersen, útvarpsstjóri. – At leggja tíðindi út á netið er bert ein náttúrligur partur í gongdini. Lurtararnir hava eisini partvís samband við okkum gjøgnum internetið, og nú geva vit teimum møguleikan at lesa tíðindi á netinum.

Ikki øll tíðindini, ið lisin verða, verða løgd út á netið. Tíðindi verða vald burturúr. Jógvan Jespersen sigur, at hetta gevur ikki útvarpinum nakað serligt eyka arbeiði, tí skipanin er øll ein basa, sum lagt verður út á.

Annars sær nýggja heimasíðan heilt snøgg út. Á vinstru síðu eru sendingarnar, sum tú kundi klikkja teg beinleiðis inn á tó burtur, kanska eitt sindur óheppið, men tó ikki so. Til ber framvegis at fara inn á heimasíðurnar hjá teimum einstøku sendingunum við at klikkja seg á »sendingar«. Eisini ber til at lurta eftir útvarpinum beinleiðis á netinum, lurta eftir einstøkum sendingum, kunna seg um skránna, lurta eftir kunngerðum og nógv annað.



Havsbrún í Fuglafirði:

# Hevur nú keypt fyrstu lastirnar av lodnu úr føroyskum sjógvi!

**- Hetta er søguligt, ásannar Bergur Poulsen, stjóri á Havsbrún**

*Vilmund Jacobsen*

Leygardagin legði Christian í Grótinum eitt nýtt kapittul aftrat føroyskari fiskivinnusøgu, sum annars er sera hendingarrík.

Hendan dagin var nótaskipið á Fuglafirði við 1600 tonsum av lodnu, sum teir løgdu upp til Havsbrún. Skipið hevur áður ført til lands og landað nógvar lodnulastir undan hesari, men tað serstaka við júst hesari lastini, er, at hon er veidd í føroyskum sjógvi, nær markinum til Íslands.

- Hetta er fyrstu ferð i søguni, at vit hava keypt lodnu undan Føroyum, ásannar Bergur Poulsen, stjóri á Havsbrún.

Christian í Grótinum, sum var skipið, ið rakti við lodnuna, er farin aftur í føroyskan sjógv at royna.

## Krúnborg og Tróndur í Gøtu

Men tað er ikki bara Christian í Grótinum, sum hevur landað føroyska lodnu til Havsbrún seinastu dagarnar.

Fyrr í vikuni var Tróndur í Gøtu á Fuglafirði við 1200 tonsum, harav teir høvdu fiskað meginpartin í føroyskum sjógvi.

Sum skilst, var Krúnborg eisini á leiðini við markið til Íslands. Teir landaðu hendan túrin í Íslandi, tí teir skuldu kortini til Íslands eftir reiðskapi.

Bergur Poulsen sigur, at nótaskipini hava væl av lodnukvotu eftir í íslendskum sjógvi og møguliga í grønlendskum sjógvi, og minkar fiskiskapurin í føroyskum sjógvi, fara tey í íslendskan sjógv at royna.

- Skipini hava kvotu eftir til fleiri túrar, sigur hann.

Tá ið tey gevast á lodnuveiði, fara tey aftur at fiska svartkjaft.



*- Hetta er fyrstu ferð i søguni, at Havsbrún hevur keypt lodnu úr føroyskum sjógvi, sigur stjórin, Bergur Poulsen. Christian í Grótinum, sum var skipið, ið rakti við lodnuna, er farin aftur í føroyskan sjógv at royna.*

## Christian í Grótinum tann fyrsti

Bergur Poulsen sigur, at tað hevur verið friðarligt á Havsbrún tað, ið farið er av hesum árinum, og tað var Christian í Grótinum, sum kom við fyrstu lastini í ár.

- Men vit hava eisini havt brúk fyri hesi tíðini, tí nógv hevur verið at farið um á virkinum, sigur stjórin at enda.

# Góður útróður, men veðrið tarnar

**Tveir snellubátar og ein línubátur hava landað á Sandi hesa vikuna**

*Vilmund Jacobsen*

**Sandur:** Tað eru ikki bara trolararnir, sum fáa nógvan fisk. Tað gera línubátarnir og útróðrarbátarnir eisini. Men seinastu dagarnar hevur viðrað illa, og tað hevur tarnað fiskiskapinum, serliga hjá teimum smærru bátunum.

## Góður útróður

Er roynandi, fáa teir, sum royna við línu, yvirhøvur nógvan fisk, og summir hava fingið heilt nógvan fisk.

Útróðrarbáturin, Antares av Sandi, hevði tríggjar setur í síðstu viku. Teir seta góðar 30 stampar hvørja ferð, og veiðan lá um 8.000 pund hvønn túrin. Og tað er heilt góður útróður. Seinastu dagarnar hevur viðrað illa, so Antares hevur ongan túr verið hesa vikuna. Slagið, teir fáa, er toskur og hýsa.

Tað eru aðrir útróðrarbátar á Sandi enn Antares, men teir eru smærri og hava tí ikki verið úti í seinastuni.

Eisini aðrastaðni frættist frá heilt góðum útróðri, har bátar hava fingið uppí 200-300 pund á stampin. Men serliga hesa seinastu tíðina hava útróðrardagarnir verið fáir.



*Báran og Morning Star, sum royna við snellu og Hoyvíkingur, sum roynir við línu, landaðu á Sandi mánadagin og týsdagin.*

## Trý skip inni

Í vikuni hava annars trý skip landað til Sandoy Seafood.

Báran og Morning Star, sum báðir royna við snellu, vóru inni mánadagin.

Teir høvdu ávikavist 21.000 og 26.000 pund av upsa. Báðir komu inn fyri veður.

Sagt verður av Sandi, at slagið, teir høvdu, var hampiliga gott; meginparturin upsi 2 og 3.

Týsdagin var línuskipið, Hoyvíkingur á Sandi; teir høvdu fullar kassar, sum viga eini 70.000 pund. Hoyvíkingur hevur roynt á Føroya Banka, og meginparturin av veiðini var toskur og hýsa.

Aftrat hesum hevur Sandoy Seafood keypt nakað av hýsu á uppboðssølu hesa vikuna.